# Vejle í tungum sjógvi



**Felagið hjá Christian Høgna Jacobsen hevur tvey tey seinastu árini tilsaman havt eitt rakstrarundirskot upp á næstan fimm milliónir**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá Vejle Boldklub seinastu árini. Í hvussu so er ikki fíggjarliga. Ítróttarliga hevur tað hilnast eitt sindur betur. Eftir niðurflyting megnaðu teir skjótt at koma aftur í superliguna. Har stríðast teir fyri at sleppa undan skjótari niðurflyting. Tað er í tí sambandinum, at teir m. a. hava skrivað sáttmála við føroyska landsliðsmannin Christian Høgna Jacobsen.

At tað ikki stendur nakað serligt til fíggjarliga fekst fyrst í hesi vikuni aftur ein áminning um. Roknskapurin fyri 2001 varð kunngjørdur, og hann vísir eitt rakstrarundirskot uppá 2,6 milliónir krónur. Í 2000 var undirskotið 2,0 milliónir krónur. Tað vil við øðrum orðum siga, at tvey tey seinastu árini hevur tað gingið 4,6 milliónir skeiva vegin. Nú er eginpeningurin 2,2 milliónir krónur. Tað vil við øðrum orðum siga, at um gongdin frá teimum seinastu árunum heldur fram komandi árini, so verður alt annað enn væl vorðið.

Í Vejle siga teir seg vera greiðar yvir, hvussu tað stendur til. Teir hava lagt um, soleiðis at flestu spælararnir nú eru í hálvtíðar starvi hjá felagnum. Fyri einum ári síðani høvdu teir nógvar spælarar í fulltíðarstarvi. Umleggingin hevur havt við sær, at rakstrarútreiðslurnar eru nógv minkaðar. At hetta ikki sæst aftur á úrslitinum fyri í fjør kemst av, at inntøkurnar frá stuðlum og sølu av spælarum eru nógv minkaðar.

Hóast soltna úrslitið, so siga teir í Vejle seg rokna við, at hetta árið fer at hilnast væl betri, enn tey bæði undanfarnu árini hava gjørt. Teir rokna við einum yvirskoti upp á tríggjar milliónir. Øktu inntøkurnar skulu fáast til vega á tann hátt, at fleiri spælarar so at siga verða seldir frammanundan, at teir veruliga verða seldir. Tað vil við øðrum orðum siga, at rætturin til møguligan vinning av sølu av spælarunum verður seldur.

Og so kann metast um, um hetta er at gera sum kellingin, sum pissaði fyri at halda hitanum!

### Føroyingar í TV3+

Fyrsta umfarið í superliguni verður 3. mars. Tá skulu Christian Høgni og teir spæla í Lyngby. Talan verður um eitt slag av lagnudysti, sum tað er av alstórum týdningi, at Vejle fer at fáa fulla úrtøku burturúr. Sum kunnugt er professionelli parturin av felagnum í Lyngby farin á húsagang. Tað vil siga, at felagið fer bara at hava amatørar á liðnum í vár.

Í næsta umfarinum eftir vetrarsteðgin fær Vejle vitjan av FCK. Hesin dysturin verður spældur 10. mars, og TV3 hevur gjørt av, at dysturin skal vísast beinleiðis. Tað vil siga, at møguleiki er fyri, at Todi Jónsson og avloysarin hjá honum á landsliðnum, Christian Høgni Jacobsen, fara at dystast ímóti hvørjum øðrum, og at møguleiki verður fyri at fylgja við á TV3+ rásini.

Vejle hevur verið á venjingarlegu í Spania. Nú eru teir komnir til hús aftur. Komandi leygardag skulu teir spæla venjingardyst ímóti AAB, og annað vikuskifti fara teir at leggja til brots í landskappingini.

# Todi millum teir fyrstu ellivu



**Í síðsta dystinum hjá FCK á ferðini í Suðurafrika var føroyski álopsmaðurin á vøllinum í ein tíma**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Í dag koma Todi Jónsson og liðfelagarnir í FCK aftur til Keypmannahavnar. Seinnapartin í gjár fóru teir úr Suðurafrika. Teinurin úr summarhitanum har suðuri og norður í kavan í Danmark er langur bæði so og so. Tí er einki at ivast í, at Todi Jónsson man kenna seg útlúgvaðan, tá hann kemur til hús. Men fótbóltsframtíðini tykist síggja hugalig út hjá honum.

Í fyrradagin spældi FCK síðsta dystin á venjingarleguni í Suðurafrika. Hann var ímóti landsliðnum hjá Malawi. Todi Jónsson var aftur hesa ferð millum teir fyrstu ellivu. Hann var í álopinum saman við Zuma. Tað má vera ein ordulig ábending um, at svenski FCK venjarin, Hans Backe, ætlar at brúka teir báðar spælararnar á toppinum, sum fyri einum knøppum ári síðani vórðu roknaðir at vera vandamiklasta álopsparið í superliguni.

Sambært heimasíðuna hjá FCK var spælið hesa ferð ikki so sannførandi, sum tað hevur verið í onkrum av hinum dystunum á ferðini í Afrika. Man tað var ivaleysa sannførandi til at vinna 5–0.

– Vit fingu stóra úrtøku burturúr málmøguleikunum. Tað boðar frá góðum. Og tað er sera hugaligt, at tað enn eina ferð eydnaðist at halda tætt í verjupartinum, varð í gjáramorgunin sagt úr FCK leguni í Suðurafrika.

Todi Jónsson var á vøllinum fyrsta tíman. So varð hann avloystur av Peter Møller. Samstundis sum Todi varð tikin av vøllinum, fór eisini miðvallarin Christian Poulsen av vøllinum. Og eina løtu seinni varð Zuma skiftur út.

Morten Bisgaard skoraði tvey mál. Hini skoraðu Carsten Fredgaard, Zuma og so Peter Møller.

# Tvær ferðir VÍF

**Meðan oddaliðið í kvinnudeildini undirheldur heimaáskoðarunum, skulu menninir til Havnar at royna seg móti H71**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tveir dystir verða leiktir í bestu hondbóltsrøðunum í kvøld.

Í Havn spæla mansliðini hjá H71 og VÍF, og mett eftir stigatalvuni, so er einki at ivast í, at vestmenningar eru stórfavorittar. Higar til hevur VÍF vunnið allar dystirnar í endaspælinum, meðan hoyvíkingar hinvegin enn hava fyrsta sigurin til góðar.

Tað hevur tó áður víst seg, at av ein hvørjari orsøk hava vestmenningar ofta havt trupulleikar í júst dystunum móti H71. Soleiðis var eisini í grundspælinum, har VÍF spældi javnt á útivølli móti H71. Tá vestmenningar eisini tykjast hava eitt slag av motivatiónstrupulleikum í løtuni, kann tískil væl verða, at uppgeðrin á Hálsi gerst meira spennandi enn væntað.

Eisini í Vestmanna verður dystur í kvøld, tá Sóljan úr Sandavági fer tvørtur um sundið.

Her eru tær á heimaliðnum sjálvsagt risa stórir favorittar. Tær hava ikki tapt dyst í Føroyum í skjótt tvey ár, og tá Sóljan samstundis hevur havt eina tilveru sum botnlið hesi bæði árini, skal ein sensatión av teimum stóru til, um VÍF skal missa nakað í hesi uppgerðini.

Dysturin í Vestmanna byrjar klokkan $19^{00}$, meðan mannfólkini fara undir dystin í Havn kl. $20^{00}$.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 5 | 5 - 0 - 0 | 499 | 297 | 202 | 22 |
| 2 | Neistin | 7 | 4 - 1 - 2 | 421 | 371 | 50 | 17 |
| 3 | Stjørnan | 6 | 3 - 1 - 2 | 454 | 375 | 79 | 16 |
| 4 | VB | 6 | 4 - 1 - 1 | 417 | 416 | 1 | 15 |
| 5 | StÍF | 5 | 2 - 0 - 3 | 321 | 402 | -81 | 5 |
| 6 | Kyndil | 7 | 0 - 1 - 6 | 426 | 508 | -82 | 4 |
| 7 | Sóljan | 6 | 1 - 0 - 5 | 330 | 499 | -169 | 4 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 6 | 6 - 0 - 0 | 532 | 442 | 90 | 23 |
| 2 | Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 559 | 473 | 86 | 18 |
| 3 | StÍF | 5 | 4 - 0 - 1 | 470 | 454 | 16 | 14 |
| 4 | Kyndil | 7 | 3 - 1 - 3 | 448 | 492 | -44 | 9 |
| 5 | H71 | 6 | 0 - 2 - 4 | 497 | 534 | -37 | 8 |
| 6 | Tjaldur | 6 | 2 - 0 - 4 | 455 | 511 | -56 | 8 |
| 7 | KÍF | 6 | 0 - 1 - 5 | 469 | 524 | -55 | 5 |



Fyrstur við tí seinasta
5 ferðir um vikuna




Ja!

Sjálvandi vil eg halda Sosialin, fyri einans 400,- kr. ársfjóðringin og sparið 380,- í mun til leysasøluprísin.

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______
Bústaður: ______
Postnr.: ______
Bygd/býur: ______
Telefon nr: ______
Undirskrift: ______

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn